# SÁTTMÁLI

um

# SAMLAGSTRYGGING

millum

# TRYGGINGARFELAGIÐ LÍV

og

# FELAG TÆNASTUMANNA LANDSINS

Í gildi tann 1. Januar 2014

# SAMLAGSTRYGGING

## § 1. HVØR ER UMFATAÐUR?

Millum Tryggingarfelagið LÍV – hereftir LÍV, og Felag Tænastumanna Landsins verður gjørdur sáttmáli um samlagstrygging fyri limirnar hjá Felag Tænastumanna Landsins.

Samlagstryggingin fevnir um hesar veitingar, útgjald við deyða og útgjald vegna hættisliga sjúku.

Henda samlagstrygginging hevur gildi frá 1. Januar 2014.

Samlagstryggingin er virkin beinanvegin treytirnar í § 2 viðv. upptøkutreytum og arbeiðsførisváttan eru uppfyltar.

Tryggingaravtalan heldur uppat tann 1. í mánaðinum aftaná, at limurin fyllir 67 ár.

## § 2. UPPTØKUREGLUR

Verandi limir í Felag Tænastumanna Landsins tann 1 januar 2014, halda fram í nýggju samlagstryggingini.

### UPPTØKUTREYTIR

Fyri nýggjar limir er tað ein treyt, at tann limur, ið teknar samlagstrygging, er fult arbeiðsførur.

### HEILSUUPPLÝSINGAR

Felagið sendir LÍV váttan um arbeiðsføri hjá limunum. Kann felagið ikki vátta fult arbeiðsførið, verður heilsuváttan send LÍV til støðutakan.

## § 3 - TRYGGINGARUPPHÆDDIR

### A. LÍVSTRYGGING

| | |
|---|---|
| Doyr tryggjaði áðrenn 40. ár, verður útgoldið | **kr. 400.000** |
| Doyr limur í aldrinum 41-50 ár, er upphæddin | **kr. 300.000** |
| - millum 51 – 60 ár | **kr. 200.000** |
| - millum 61 til 67 ár | **kr. 100.000.** |

### B. "HÆTTISLIG SJÚKA"

Samlagstryggingin fevnir eisini um útgjald í samband við "hættisliga sjúku" sambært tryggingartreytir fyri hættisliga sjúku.

Tryggingin tekur við ein mánaða aftaná tekningardagin, - karenstíð 1 mðr. Útgoldið verður sostatt í fyrsta lagi í samband við "hættisliga sjúku", sum er staðfest aftaná 1. Februar 2014.

Tryggingarupphæddin í samband við hættisliga sjúku hjá liminum er **kr. 100.000.**

Møguligt útgjald í samband við hættisliga sjúku verður mótroknað í veitingini við deyða, um limurin doyr áðrenn 3 mánaðar eru liðnir, frá tí degi sjúkan varð staðfest, sjá § 4 í tryggingartreytunum fyri "hættisliga sjúku".

### C. "HÆTTISLIG SJÚKA" - BØRN HJÁ LIMUNUM

Samlagstryggingin fevnir eisini um útgjald í samband við "hættisliga sjúku" hjá børnum hjá limi, sambært galdandi tryggingartreytir fyri hættisliga sjúku.

Tryggingarupphædd í samband við hættisliga sjúku hjá børnum er **kr. 100.000.**

Hevur eitt barn fingið staðfest eina hættisliga sjúku, áðrenn innliman í hesa samlagstrygging, er henda sjúka ikki fevnd av tryggingini. Verður tryggingarupphæddin útgoldin, fellur tryggingin av viðkomandi barni burtur.

### D. GJALDSUNDANTØKA:

Missir limur 2/3 ella meira av arbeiðsorku síni, fellur tryggingargjaldið burtur aftaná 3 mánaða óarbeiðsføri. LÍV rindar tryggingargjaldið, so leingi óarbeiðsføri stendur við, tó í mesta lagi 3 ár.

## § 4 – ÚTGJALD AV TRYGGINGARUPPHÆDD

Doyr persónur, ið er samlagstryggjaður sambært hesum sáttmála, verður tryggingarupphæddin útgoldin til næsta avvarðandi, uttan so at annað skrivligt er avtala millum tryggjaða og LÍV.

"Næsti avvarandi" er sambært Forsikringsaftaleloven og Tryggingartreytum fyri Samlagstrygging, § 2, stk 2., "fyrst hjúnarfelagin, tínæst børn og síðani arvingar sambært arvalógini ella testamenti". Við børn er her at skilja lívsarvingar og ættleidd børn hjá tryggjaða.

Hevur tryggjaði gjørt testamenti, ið eisini fevnir um hesa samlagstrygging, skal váttað avrit sendast LÍV. Tað verður gjørt vart við, at testamenti, ið LÍV ikki hevur kunnleika til, sambært Forsikringsaftaleloven ikki er galdandi í samband við útgjald av møguligari tryggingarupphædd.

Tryggingarupphæddin í samband við "hættisliga sjúku" og lokaupphædd, verður útgoldin til limin.

### SKATTAVIÐURSKIFTI

Tryggingargjaldið til samlagstryggingina kann ikki dragast frá skattskildugu inntøkuni. Møgulig útgjøld úr skipanini eru skattafrí. Víst verður til rentutryggingarlógina.

# § 5 – ÚTROKNINGAR AV TRYGGINGARGJALDI

### TRYGGINGARÁR, ÚTROKNINGAR AV TRYGGINGARGJALDI OG UPPLÝSINGARSKYLDA

Tryggingarárið er álmanakkaárið.

Tann 1. januar á hvørjum ári sendir Felag Tænastumanna Landsins eitt yvirlit til LÍV við upplýsingum um tryggjaða við:

navn, føðingardag/P-tal, bústað og ígildis- ella úrgildisdegi.

### TRYGGINGARGJALD OG REGULERINGARGJALD

Tryggingargjaldið fellur til gjaldingar frammanundan hálvárliga og verður inngoldið av Felag Tænastumanna Landsins til LÍV. Við teimum tryggingargjøldum, ið vóru galdandi fyri farna hálvár, verður reguleringstryggingargjald útroknað og avroknað saman við tryggingargjaldinum fyri tann 1. januar og 1. juli.

Tryggingargjald verður ásett samsvarandi koncessión fyri samlagstrygging, ið er galdandi fyri LÍV. Tryggingargjaldið verður ásett av nýggjum á hvørjum ári við støði í aldrinum hjá teimum tryggjaðu limunum.

### MINSTA TAL AV TRYGGJAÐUM PERSÓNUM

Fer talið á teimum tryggjaðu sambært hesum sáttmála niður um 25 persónar, heldur tryggingin uppat, tá tryggingarárið er úti. Hetta verður fráboðað Felag Tænastumanna Landsins við innskrivaðum brævi.

# § 6 - BONUS

Bonus, ið verður tillutað hesi tryggingaravtalu sambært bonusreglugerð stovnsins, verður góðskrivað Felag Tænastumanna Landsins á serliga konto at nýta sum útjavnan av tryggingargjaldinum árið eftir.

# § 7 - TAGNARSKILDA

Allir upplýsingar, ið verða latnir LÍV, verða givnir í trúnaði. Hetta er galdandi, bæði meðan sáttmálin partanna millum er í gildi og um avtalan møguliga heldur uppat.

# § 8 - TRYGGINGARTREYTIR

Fyri henda sáttmála galda Tryggingartreytir fyri Samlagstrygging sambært koncessión fyri LÍV. Afturat hesum galda treytirnar í viðtøkunum fyri LÍV og galdandi lógir.

# § 9 - SÁTTMÁLASKJØL

Hesin sáttmáli verður undirskrivaður í tveimum einsljóðandi eintøkum og fær hvør partur sítt eintak í varðveitslu.

## Í GILDI OG UPPSØGN AV SÁTTMÁLANUM

Hesin sáttmáli verður settur í gildi tann 1. Januar 2014.

Sáttmálin kann uppsigast skrivliga av báðum pørtum við 3 mánaða freist at fara úr gildi við árslok.

Koma broytingar í koncessión og tryggingartreytum, skal LÍV skrivliga fráboða Felag Tænastumanna Landsins um hesar broytingar.

Tórshavn, tann 20/12-2013

**Tryggingarfelagið LÍV**

Tórshavn, tann 20/12-2013.

**Felag Tænastumanna Landsins**